# Fer ikki upp á kompromis við andaligu sannføringina

**– Tjóðveldisflokkurin hevur fylgt ómetaliga nógv hjá mær, men tað andaliga hevur altíð havt eitt størri pláss, og eg meti ikki, at eg kann kompromis við tað, sigur Karsten Hansen um avgerð hansara um at fara úr Tjóðveldisflokkinum**

POLITIKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Eftir tingfundin í gjár savnaðist tingmanningin hjá Tjóðveldisflokkinum, tí næstformaður floksins hevði eini boð at bera teimum. Hann tók seg úr flokkinum, sum ein beinleiðis avleiðing av, at málið um at fáa kynsliga orientering í skoytta upp í grein 266b í revsilógini, varð samtykt. Eitt mál, sum floksfelagar hansara, Finnur Helmsdal og Annita á Fríðriksmøk, vóru uppskotsstillarar til.

– Hetta hevur verið ein ómetaliga trupul avgerð at taka, tí Tjóðveldisflokkurin hevur alt tað eg kann minnast verið ein partur av mínum gerandisdegi, sigur Karsten Hansen um avgerðina.

### Lurtaði eftir samvitskuni

Spurningurin er so hví Karsten Hansen metir, at tað er neyðugt at taka seg úr flokkinum? Fyri Karsten Hansen er svarið einfalt.

– Tjóðveldisflokkurin hevur fylgt ómetaliga nógv hjá mær, men tað andaliga hevur altíð havt eitt størri pláss. Eg meti ikki, at eg kann kompromis við tað, og tí havi eg lurtað eftir míni samvitsku, greiðir Karsten Hansen frá.

Karsten Hansen fer nú at hugsa um hvussu hansara framtíð kemur at síggja út, og hevur ikki tikið nakra avgerð um hann fer í annan flokk ella ikki. Kortini sigur hann so mikið sum, at hansara politiska sannføring enn er hin sama, og tjóðveldishugsjónin er tað, politiska hjartað hansara bankar fyri.

Tað var um náttúrðatíð í gjár, at Karsten Hansen boðaði tingbólki Tjóðveldisfloksins frá avgerð síni, og í dag fer hann at boða tinginum frá, at hann ikki longur er partur av Tjóðveldisflokkinum.


*Karsten Hansen fer í dag at boða tinginum frá avgerð sínari*

## Norðoya Tjóðveldisfelag harmast

**Nevndin í Norðoya Tjóðveldisfelag harmast støðuna og ta avleiðing, sum málið um grein 266b hevur fingið, og ein meirluti í nevndini vónar, at tingmanning floksins og Karsten Hansen finna saman aftur**

POLITIKUR
*Rólant Waag Dam*

Tað boðar Norðoya Tjóðveldisfelag frá, í einum tíðindaskrivi.

– Nevndin í Norðoya Tjóðveldisfelag harmast støðuna og ta avleiðing, sum málið um grein 266b hevur fingið, nú Karsten Hansen hevur tikið seg úr tingbólki Tjóðveldisfloksins.

– Ein meiriluti í nevndini vónar, at tingmanning Tjóðveldisfloksins og Karsten Hansen finna saman og halda á at vera virðilig umboð á tingi.

– Norðoya Tjóðveldisfelag takkar Karsteni Hansen fyri hansara umboðan í flokki vára og heitir samstundis á Karsten Hansen um framhaldandi at stuðla tjóðveldispolitikki, sigur Norðoya Tjóðveldisfelag í tíðindaskrivi í morgun.

# Høgni er keddur og ørkymlaður

**Formaður Tjóðveldisfloksins hevur ilt við at skilja avgerðina, Karsten hevur tikið, tí talan er um eina demokratiska avgerð. Hann er bæði keddur og ørkymlaður, men sigur samstundis, at í Tjóðveldisflokkinum eru tað frælsi og fólkaræðið og ikki trúarspurningar, sum standa ovast**


*Høgni Hoydal og Finnur Helmsdal harmast báðir tveir um, at Karsten Hansen nú fer úr flokkinum*

POLITIKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

– Eg eri keddur og havi sjálvandi trega av tí. Soleiðis sigur formaður Tjóðveldisfloksins um avgerðina hjá nú fyrrverandi formanninum í flokkinum, Karsten Hansen, um at taka seg úr Tjóðveldisflokkinum.

– Vit hava øll heitt á Karsten um vera verandi í flokkinum. Vit vónaðu eisini, at avgerðin kundi bíða fram til vit høvdu floksting, men tað skuldi tað heldur ikki vera, sigur Høgni Hoydal.

Tjóðveldisflokkurin hevur við hesum mist eina ímynd av flokkinum, men Høgni Hoydal er kortini ikki beiskur.

– Dyrnar vera altíð opnar fyri Karsten.

### Ørkymlaður

Málið um ískoyti av kynsligari sannføring í grein 266b í revsilógini, hevur fylgt meir enn nakað annað politiskt mál í nýggjari tíð. Frá tí málið kom fyri hevur verið greitt, at tað bara var ein flokkur sum hevði ein floksspolitiska støðu í málinum, og tað var Miðflokkurin. Í øllum hinum flokkunum var talan um persónsmál, har flokkurin ikki blandaði seg upp í hvørja støðu einstaki limurin hevði. Tí ørkymlar tað formannin í Tjóðveldisflokkinum, at Karsten Hansen kann taka eina so ógvusliga avgerð.

– Eg eri keddur, men eisini ørkymlaður av hesum, tí alla tíðina hevur verið greitt, at hvør einstakur atkvøður eftir síni egnu sannføring í málinum, sigur Høgni Hoydal og vísir á, at øll mál mugu kunna viðgerast opið politiskt.

### Trúarspurningurin ein trupulleiki

Høgni Hoydal heldur, at tað má bera til at arbeiða politiskt, uttan at hava felags áhuga, tá tað kemur til trúarspurningar.

– Eg meti tað vera ein álvarsaman trupulleika fyri demokratiið, um politikarar fara at býta seg eftir síni átrúnaðarligu sannføring, sigur hann.

### Roknaði ikki við tí

Spurdur um hann hevði roknað við, at málið kundi hava so ógvusligar fylgjur við sær, svarar Høgni Hoydal, at tað hevði hann ikki.

– Nei, tað hevði eg ikki. Men vit vistu hvørja støðu Karsten hevur í málinum. Kortini hava eg ilt við at skilja avgerðina hann hevur tikið, tí talan er um eina demokratiska avgerð, sigur Høgni Hoydal.

Spennandi verður nú at fylgja, hvørjar avleiðingar tað kemur at fáa fyri Tjóðveldisflokkin, at næstformaður teirra nú fer frá.

– Tað ynski eg ikki at døma um nú. Í Tjóðveldisflokkinum eru tað frælsi og fólkaræðið og ikki trúarspurningar, sum standa ovast, sigur Høgni Hoydal avgjørdur.

Nú skal nýggjur næstformaður finnast, og verður tað gjørt, tá Tjóðveldisflokkurin hevur floksting.

# Helst líka frægt eg onki visti

**Finnur Helmsdal harmast um avgerðina, Karsten Hansen nú hevur tikið. – Eg visti ikki, at hetta fór at vera avleiðingin, men tað er kanska eisini líka frægt, at eg ikki visti nakað um tað, sigur hann**

POLITIKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Finnur Helmsdal var, saman við Annitu á Fríðriksmørk, uppskotsstillari í málinum, sum nú er orsøk til, at Karsten Hansen hevur tikið seg úr Tjóðveldisflokkinum. Hann harmast um avgerðina, sum hansara nú fyrrverandi partamaður hevur tikið um at fara úr flokkinum.

– Eg havi saman við Annitu lagt uppskotið fram, og tað síggi eg onki skeivt í. Men eg harmist um avgerðina hjá Karsteni. Vit kundu ikki vitað, at hetta fór at verða avleiðingin, sigur Finnur Helmsdal, og leggur so aftrat, at tað var kanska líka frægt, at hann ikki visti nakað um tað.

Spurdur um hann harvið sigur, at hann ikki hevði lagt uppskotið fram, um hann visti at Karsten Hansen legði frá sær, um uppskotið kom ígjøgnum, svarar Finnur og sigur, at so er ikki.